# Missiónsmánaður í KFUM og K

**Í mong ár hevur samkoman, KFUM og K í Klaksvík, skipað fyri missiónsviku. Men nú er missiónsvikan býtt um við vikuskiftismøtir, sum verða hildin hvørt vikuskifti allan november mánaða. Sum nakað nýtt, verður eisini farið út á bygdirnar við gleðiboðskapinum**

MISSIÓNSMÁNAÐUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Umframt talu, sang og vitnisburðir, er eisini sosial samvera á skránni og eftir møtini hugna fólk sær við einum drekkamunni. Í eini tíð, har fólk eru ógvuliga upptikin, og ikki hava stundir at vitja hvønn annan eins nógv og fyrr, er hetta ein týðandi partur í arbeiðnum hjá samkomunum*
*Myndir: Bárður Lydersen*



- Okkurt klókt høvd fann uppá at royna at hava møtini hvørt vikuskifti ein heilan mánaða í staðin fyri eina viku, sum vanligt hevur verið fyrr.

Hetta sigur Tummas Pauli Mýri, sum er ein av fyriskiparunum av møtunum, sum vikuskiftini í november verða hildin í KFUM og K í Klaksvík.

Møtini hesaferð hava heitið, "Fylg mær".

- Tað hevur eydnast stak væl at havt møtini á henda hátt, og tey hava verið væl vitjaði.

- Ein av fyrimununum við at hava møtini í vikuskiftum heldur enn eina heila viku er, at tað er lættari at fáa fólk, sum kunnu luttaka við sangi og talu.

- Eisini røkka vit fleiri, tí nú sleppa eisini tey, sum onkuntíð arbeiða í vaktum, ella eru til sjós, til á okkurt av møtunum, sigur Tummas Pauli.

Í samband við missiónsmánaðin, verður sum nakað nýtt, eisini farið út á bygdirnar í Norðoyggjum við gleðiboðskapinum.

Í kvøld er ætlanin at fara út til Fugloyar og til Mikladals.

Haraldsund og Húsar eru eisini á skránni hetta vikuskifti; har verður møti í annaðkvøld. Møtini verða klokkan 19.30.

Leygarkvøldið verður serstakt møti, har Hilda Viderø Johannesen, fer at greiða frá uttanlands missión. Gimmi Olsen verður online úr Afrika og fer at greiða frá arbeiði sínum sum lærari hjá trúboðarabørnum har.

Sunnudagin klokkan 14.00 verður familjumøti, og á møtinum klokkan 18.00 fer Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, at tala. Sangkórið úr Tabor á Toftum fer at syngja.

Umframt talu, sang og vitnisburðir, er eisini sosial samvera á skránni, og eftir møtini hugna fólk sær við einum drekkamunni.

- Í eini tíð, har fólk eru ógvuliga upptikin, og ikki hava stundir at vitja hvønn annan eins nógv og fyrr, er hetta ein týðandi partur í arbeiðnum hjá samkomunum, sigur hann.

Tað er Pól Jóhannesen trúboðari, sum hevur høvuðsábyrgdina av møtunum í KFUM og K í Klaksvík.

- Tað krevur nøgva tíð og orku at skipa fyri slíkum møtum, men tað er stríðið vert, tá vit síggja at arbeiðið ber frukt, sigur Tummas Pauli Mýri at enda við Sosialin.

# Væleydnað konsert í Christianskirkjuni






*Tað var ein fragd at hoyra lætta sangin og tónleikin hjá kórum og orkestri í Cristianskirkjuni næstseinasta sunnudag*
*Myndir: Bárður Lydersen*

**Tað var lív í Christianskirkjuni, tá ið kórini frá sangskeiðnum í Nesvík høvdu konsert har næstseinasta sunnudag**

KONSERT
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Í samband við missinónsmánaðin hjá KFUM og K, varð skipað fyri konsert í Cristianskirkjuni næstseinasta sunnudag.

Í 25 ár á rað, hevur heimamissiónin skipað fyri sangskeiðum, seinastu árini í Nesvík.

Tað vóru vaksnamanna- og barnakór frá sangskeiðnum har, ið saman við orkestri, gleddu áhoyrararnar við frálíka sangi og spæli sínum.

Konsertin í Christianskirkjuni hevur eisini gjørt sítt til at savna fólk til møtini, sum henda mánaðin verða hildin í KFUM.

- At ganga á møti, er sum alt annað ein vanasak, og sjálvsagt vóna vit, at fleiri fara taka henda góða vana til sín, siga tey í KFUM og K í Klaksvík.





*Fuglafjørður við sínum fyrimunum…*



*… og Runavíkar kommuna við sínum*

# Tey ungu velja Runavík; tey gomlu Fuglafjørð

**Hóast oyndfirðingar týsmorgunin tóktust vera í iva um, hvørt meiriluti fór at verða fyri samanlegging við aðra kommunu, varð úrslitið, tá ið saman um kom, rættiliga sannførandi**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Árni Joensen, bygdarráðsformaður, er sannførdur um, at skal Oyndarfjørður ikki gerast eftirbátur, nú fleiri og fleiri økir skulu leggjast út til kommunurnar at umsita, noyðist kommunan at leggja saman við aðrari størri kommunu*

136 veljarar høvdu atkvøðurætt í Oyndarfjarðar kommunu týsdagin, tá ið bygdarfólkið hevði høvi at atkvøða um, hvørt kommunan skal leggja saman við aðrari kommunu ella ikki. Tá ið upptalt varð, høvdu 80 veljarar atkvøtt ja fyri samanlegging, og 30 veljarar høvdu atkvøtt nei. Hetta merkir, at nýggj fólkaatkvøða verður í Oyndarfirði aftur komandi týsdag. Tá verður valið ímillum at leggja saman við Fuglafjarðar kommunu ella Runavíkar kommunu.

### Fólkið avger

Týsmorgunin, áðrenn valhølið læt upp, hittu vit bygdarráðsformannin, Árna Joensen, sum var til arbeiðis á skrivstovu síni í Oyndarfirði, har hann selir fisk fyri P/F Vesturvón.

Hann duldi ikki fyri, at hann fór at atkvøða fyri samanlegging, men vildi ikki siga hvørja kommunu, hann mælir til, at lagt verður saman við - um meiriluti varð fyri samanlegging.

– Hetta er ein avgerð, sum veljararnir sjálvir skulu taka. Onkur sigur, eg eri vingliskøltur, tí eg ikki vil avdúka mína støðu, men gevi eg mína støðu til kennar, kann tað kanska ávirka avgerðina hjá fólkinum. Tað vil eg helst ikki, segði Árni.

Týsmorgunin var hann ikki sannførdur um, at oyndfirðingar fóru at atkvøða fyri samanlegging, men sum kvøldið leið, og úrslitið fyrilá, var allur ivi skúgvaður til viks.

Meirilutin fyri samanlegging var kanska størri, enn fleiri høvdu væntað.

### Á vegamóti

Nú avgerðin um samanlegging er tikin, er næsta stigið at velja kommununa, ið leggjast skal saman við.

Bæði Fuglafjarðar kommuna og Runavíkar kommuna hava lagt tilfar úr hondum, sum íbúgvarnir í Oyndarfirði hava fingið borið á dyrnar. Somuleiðis hevur borgarafundur verið í bygdini, har framløga var av hesum tilfari sum lýsir fyrimunir og vansar við samanlegging – antin valið verður hendanvegin ella handanvegin.

– Eg haldi, at Fuglafjarðar kommuna "fiskar" meira eftir okkum enn Runavíkar kommuna ger, eitt nú við ætlaða tunlinum millum Fuglafjørð og Hellurnar. Hinvegin hava vit fingið at vita, at vit fáa umleið sama status í Runavíkar kommunu sum aðrar smáar bygdir í kommununi, eitt nú Rytuvík, Æðuvík og Lamba.

Í Oyndarfirði søgdu tey, at hevði tunnilin millum Fuglafjørð og Hellurnar verið komin, er lítið at ivast í, at oyndfirðingar høvdu valt at lagt saman við Fuglafjarðar kommunu.

– Men tunnilin er ikki komin enn, og vit vita ikki við vissu, nær ella um hann kemur.

Frá gamlari tíð hevur nógv samband verið millum Oyndarfjørð og Fuglafjørð, og enn í dag samstarva kommunurnar á ávísum økjum. Vegurin kom ikki fyrr enn seinast í sekstiárunum og fyri ta tíð, var farið upp um fjallið - ella við báti til Fuglafjarðar.

– Síðan vegurin kom, er teinurin styttri út til Runavíkar enn til Fuglafjarðar, søgdu tey.

Oyndarfjarðar kommuna samstarvar eisini við Runavíkar kommunu.

### Ættarskiftið

Oyndfirðingar, sum Sosialurin prátaði við týsmorgunin, vóru eftir øllum at døma meira í iva um, hvørt fólk fóru at velja samanlegging – enn um hvørja kommunu, lagt verður saman við, um fólkið segði ja til samanlegging.

Tey trý, sum sita í valnevndini, Hjørleif Gaard, Hilmar Petersen og Eyðbritt Jacobsen, tóktust rættiliga samd um, at velja oyndfirðingar at leggja saman við aðrari kommunu, fellir valið helst á Runavíkar kommunu.

– Sum er, er teinurin út til Runavíkar styttri, og vinnulívið í økinum er meira fjøltáttað. Hinvegin eru eisini nakrir fyrimunir við Fuglafjarðar kommunu, eitt nú skúlaverkið á Kambsdali.

Bondini, sum vóru millum Oyndarfjørð og Fuglafjørð, hava sum skilst minni týdning fyri yngra ættarliðið enn fyri tey gomlu.

– Vit rokna við, at yngra ættarliðið fer at velja Runavíkar kommunu, meðan tey gomlu fara at velja Fuglafjarðar kommunu, søgdu tey í Oyndarfirði týsmorgunin.

Ógjørligt er at siga, hvat hendir á fólkaatkvøðuni, sum verður, 25. november.

Og hvør veit: Kanska verður úrslitið tá líka so óvæntað, sum úrslitið týsdagin.

# Eldrasambýlið í Gøtu stendur reist

**Gøtu kommuna hevur samtykt, at alt húsið skal gerast liðugt undir einum, og væntandi verður eldrasambýlið tikið í nýtslu í august/september mánaða komandi ár**

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni varð eldrasambýlið, sum Gøtu kommuna letur byggja í Norðragøtu, reist.

Í hesum sambandi skipaði kommunan mikukvøldið fyri drekkamunni fyri teimum, sum á ymiskan hátt eru knýtt at byggingini. Drekkamunnurin var í Glyvra Hanusar húsi í gomlu bygdini í Norðragøtu.

Haldóra Ranghamar, bygdaráðsformaður í Gøtu kommunu, sigur, at upprunaliga ætlaði kommunan bert at gera ovaru hæddina lidna fyrst, men síðan hevur kommunan samtykt, at alt húsið skal gerast liðugt undir einum.

– Í ovaru hæddini verður pláss fyri 10 búfólkum, og í niðaru hæddini verður pláss fyri 6 fólkum. Í niðaru hæddini verða eisini hølir til teir aktivitetir, sum eru í Gøtubráð í dag.

Haldóra Ranghamar væntar, at eldrasambýlið í Norðragøtu stendur liðugt at taka í nýtslu um mánaðarskiftið, august/september komandi ár, og metti kostnaðurin av byggingini verður einar 13-14 milj. krónur.



*Eldrasambýlið í Gøtu er reist í vikuni. Mikukvøldið var drekkamunnur í Glyvra Hanusar húsi í Norðragøtu fyri teimum, sum á ymiskan hátt eru knýtt at byggingini.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*